

Mads Nesá spular hinar tríggjar ein av góðveðursdøgunum í síðstu viku.



Sólin er heit, men vatnið er kalt.
Vit síggja, fv.: Tony Saltá, Odd Højgaard og Arthur Højgaard.

# Spulaðir um allan kroppin

SUMMAR
*Vilmund Jacobsen*

Teir góðu og lýggju summardagarnir í Føroyum við brennandi sól eru ikki altíð so nógvir. Summi ár kunnu teir teljast á báðum hondum. Onnur ár hildnast betur. Er veðrið gott nakrar fylgjandi dagar, og vit síðan hava regn ella mjørka í tveir dagar, siga tey flestu, at summarið nyttar einki; tað er bara regn og mørki.

Helst seta mong sær ov stórar vónir til summarið, og tá ið tað so ikki hildnast, sum vit vilja hava tað at gera, hava vit ilt við at síggja tær góðu løturnar, sum hóast alt eru.

Vit plaga at siga, at skulu vit mála, so skal tað helst vera í mai ella so tíðliga um summarið sum gjørligt. Hetta er tó ikki altíð so. Mai mánaði í ár royndist ikki so væl til turrveður og sól, men í síðstu viku høvdu vit nakrar heilt góðar dagar, helst teir bestu á árinum.

Teir gomlu plagdu at siga, at tá ið tað fer at myrkja aftur á náttini, t.v.s. eftir 21. juni, er besta tíðin til góðveður á summarinum umliðin. Tað óstøðuga veðrið kemur, tá ið tað fer at myrkja aftur á náttini. Men hetta heldur ikki altíð, tíbetur kunnu vit siga. Flestu vilja hava, at summarið er so langt, sum Várharra nú einaferð loyvir tí at vera.

Roynist summarið ikki til veður, kunnu vit ugga okkum við, at vit hava nógvar góðar løtur um vetrarnar. Hvat er vakrari enn liggjandi góðveður í januar? Hugsa vit okkum um, eiga vit nógvar slíkar løtur, bæði um heystið, veturin og várið.

## Spulibað

Ein av góðveðursdøgunum í síðstu viku duttu vit fram á hesar dreingirnar, sum hugnaðu sær óført við eini spuluslangu.

Omanfyri bakaði sólin yvir beru dreingjakropparnar, men vatnið í slanguni var kalt. Tað sást, tí dreingirnir krympaðu bæði kropp og tær, tá ið slangan stóð beint á teir!

Mamman til tann eina av trimum, sum stóð fyri vatnstráluni, kom á staðið við myndatóli, og hon skjeyt upp at venda slanguni uppeftir og soleiðis stroyða vatnið niður yvir teir tríggjar, so vatnstrálan ikki virkaði so ógvuslig á beru kropparnar.

Hendan dagin spældu eisini onnur børn "vatnkríggj", men tá ið var myndatólið ikki í bilinum.

Hugsandi er, at vit fara at síggja fleiri slík "vatnkrígg" í summar, nú onnur børn síggja, hvussu stuttligt hetta er. Hetta er vandaleyst spæl, men ein øðrvísi løta, sum børnini minnast leingi - og kanska ein "avvekslingur"til tann nógva fótbóltin, sum er í SvF í hesum døgum.

# SvF sæst alt ov illa á Kambsdali

**Á Kambsdali eru tey misnøgd við ta tænastu, sum Sjónvarp Føroya veitir teimum, og tí vilja fólk heldur ikki rinda SvF-gjald.**

SJÓNVARP
*Vilmund Jacobsen*



*Nú HM-fótbóltur er, hyggja fólk á Kambsdali eisini at fótbólti á Euro Sport.*
*- SvF sæst so illa, at torført er viðhvørt at kenna leikararnar, sigur Beinir N. Olsen, sum býr á Kambsdali*

Fólk, sum búgva á Kambsdali, eru alt annað enn nøgd við signalið hjá Sjónvarpi Føroya. Tey siga, at nú HM í fótbólti er, er stundum torført at kenna leikararnar - so illa, sum sjónvarpið sæst.

Hetta er ikki nakar nýggjur trupulleiki.

Beinir N. Olsen sigur, at tey hava altíð sæð illa á Kambsdali.

- Vit hava ongantíð verið nøgd við signalið hjá SvF, sjálvt um tað var uppaftur verri tey fyrstu árini. Í dag er signalið heldur frægari, men alt annað enn nóg gott.

Beinir sigur, at flestu hús á Kambsdali hava fingið sær parabol, og nú HM-fótbóltur er, sita mong og hyggja at Euro Sport heldur enn SvF.

## Vilja ikki rinda SvF-gjald

Men vilja fólk, sum ikki síggja SvF nóg væl, kortini rinda sjónvarpsgjald eins og tey, sum síggja væl, spurdu vit Bein.

- Eg havi skilt, at nógv fólk her í bygdini vilja ikki skráseta seg hjá SvF og rinda tískil heldur ikki SvF-gjald, tí tænastan er so vánalig.

Beinir heldur ikki, at SvF hevur gjørt nógv við at fara í rættin við teimum, sum ikki rinda, tí SvF veit, at tænastan als ikki er nøktandi.

- Tað, sum argar fólk, er, at hetta ikki er nakar nýggjur trupulleiki, men ein trupulleiki, sum altíð hevur verið, síðan fólk settu búgv á Kambsdali, og tað halda vit vera ov vánaligt, sigur hann.

Ein kona, sum Sosialurin tosaði við, sigur, at tey flestu, sum búgva á Kambsdali, grenja um signalið, men eingin ger nakað við tað.

- Men SvF veit, hvussu vorðið er, og vit halda tað vera ov vánaligt, at verulig stig ikki langt síðan eru tikin til tess at gera nakað við hetta, sigur hon.

## Eingin at hitta

Sosialurin ringdi í gjár til sjónvarpsstjóran, Mikkjal Helmsdal, fyri at fáa eina viðmerking frá honum, men á skrivstovuni hjá SvF søgdu tey, at hann var staddur í Sandoynni. Vit ringdu eisini á fartelefonina, men hon var sløkt.

Vit royndu eisini at fáa fatur á onkrum øðrum persóni, sum kanska visti okkurt at siga okkum um, hví SvF-signalið á Kambsdali er so vánaligt, og í øðrum lagi, um fólk á Kambsdali verða kravd eftir SvF-gjaldi eins og onnur, men eingin, sum kundi siga okkum nakað, var at hitta.

Tað er Føroya Landsstýri, sum eigur sendinetið, sum FøroyaTele umsitir.

Sosialurin fer at venda aftur til málið um líkindini hjá kambsdalsfólki at síggja SvF.



# Skúlin er liðugur...

**Í dýrdarveðri fríggjadagin hildu tíggjunda flokkarnir í báðum skúlunum í Klaksvík seinasta skúladag. Tey høvdu gjørt nógv burtur úr**

SKÚLI
*Solby A. Eliasen*



*So skjótt onkur úr tíggjunda kom til sjóndar, bleiv hann ella hon umringað av teim yngru næmingunum, sum vildu hava fleiri karamellur ella eina ballón*



*Desperat to get in – Dying to get out " stóð á skeltinum við inngongdina til skúlan við Ósánna fríggjamorgunin*



*Don´t worry – be happy " stóð við inngongdina til skúlan á Ziskatrøð*

**Klaksvík:** Tá Sosialurin kom niðan í skúlarnar henda morgunin hoyrdist nógvur tónleikur úr skúlagarðinum í Skúlanum á Ziskatrøð. Næmingarnir í tíggjunda flokki stóðu uppi á skýlinum og gjørdu alt til undirhaldið tilreiðar. Eisini tveittu tey karamellur út til øll børnini, sum stóðu í garðinum og hugdu at.

Onki var at ivast í, at tey mongu børnini stóðu og ímyndaðu sær, tá tey einaferð sjálvi skulu standa har og kasta karamellur og frøast, tí tey eru liðug við fólkaskúlan.

Hóast báðir skúlarnir liggja so tætt upp at hvørjum øðrum, so varð seinasti skúladagur hildin í hvør sínum skúla.

Næmingarnir høvdu verið uppi stóran part av náttini ella alla, og so høvdu tey gingið runt til lærararnar, sum tey hava havt og gjørt eitt hvørt við húsi ella bilin hjá teimum.

Tey høvdu eisini nógvar ballónir, og gassfloyturnar dundu um allan býin megninpartin av hóskvøldinum og fríggjadegnum.

Í skúlanum við Ósánna vóru allir lærararnir til kaffi inni í stovunum hjá tíggjunda flokkunum. Meðan teir hugnaðu sær har, høvdu næmingarnir í tíggjunda allar teir yngru flokkarnar. Hetta er nakað, sum næmingarnir í tíggjunda sjálvir hava tikið stig til, meðan lærararnir eru til kaffi.

- Oysssjj!! Tað er strævið!! Eg ætli mær ikki at verða lærari, tók ein næmingur, sum kom út úr eini skúlastovu, til.

- Tey ganga bara runt, hóast man rópar á tey og biður tey seta seg niður. Tað er sum um tey slettis ikki vita, at man er har.

Tá lærararnir vóru komnir inn aftur og tóku yvir aftur í teim yngru flokkunum, fóru næmingarnir í tíggjunda út á takið á skúlanum, har skipað varð fyri ymiskum undirhaldi við nógvum tónleiki afturvið.

Seinni um dagin var so fótbóltsdystur millum næmingar og lærarar. Og seinasti skúladagurin endaði við, at allir næmingarnir fóru ein rundtúr við einum lastbili, har tey stóðu í lastini og floytaðu og róptu, meðan tey tveittu karamellir út til fólk, sum gingu á gøtuni og nutu tað góða summarveðrið.

Fyri framman hjá hesum tíggjunda floks næmingum liggja nú tær munnligu próvtøkurnar. Prógvið fáa tey tann 27. juni.

Og so stendur summarfrítíðin fyri framman, áðrenn tey fara út í tað veruliga lívið, sum so ofta verður tikið til. Onkur fer helst beinleiðis víðari á miðnámsskúla, meðan onnur fara út at arbeiða. Onkur av næmingunum fer eisini ein túr uttanlanda at ganga í skúla, sum útskiftisstudentur.

# Tombola til frama fyri matbil

**Leygardagin skipaði Norðoya Ellis og Vistarheim fyri einum tombola við meira, sum tey sjálvi kalla tað, til frama fyri ein matbil, sum skal nýtast til at koyra døgurðar út til teir óhjálpnu pensjonistarnar**

ELDRARØKT
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Sum nú er, eru tað heimarøktarnir, sum koyra døgurðarnar út til fólki í egnum bili. Einar Joensen, fyribilsleiðari á Norðoya Ellis og Vistarheimi, sigur, at tey longi hava hugsað um, at tað ikki er so gott, at heimarøktarnir nýta egnan bil til hetta endamálið.

- Tí hildu vit, at tað kundi verðið gott at fingið ein matbil, sum vit so eisini høvdu kunnað nýtt til onnur endamál, tá hann ikki verður nýttur til mat. Her hugsi eg um eitt nú, at koyra eftir heilivági, eftir vøru á sjúkrahúsinum ella bara til at fara ein biltúr við teim eldru, so tey kunnu sleppa út eitt sindur, greiðir Einar frá.

Sum nú er, leiga tey eldru sær ein hýruvogn, tá tey vilja sleppa ein biltúr. Einar heldur, at tað er ov dýrt hjá teimum, og tí verður tað ofta langt í millum biltúrarnar.

Orsøkin til, at tey skipa fyri tílíkum tiltøkum fyri at fáa ein bil, er, at mattænastan er ein sjálvboðin tænasta, sum Vistarheimið og Heimarøktin taka sær av.

- Vit hjálpa hvørjum øðrum á tann hátt, at vit gera matin fyri heimarøktararnar, og heimarøktararnir koyra hann so út fyri okkum, sigur Einar, sum vónar, at tað fer at kunna verða gjørligt at koyra enn fleiri døgurðar út enn tað verður gjørt í dag, tá matbilurin er komin. Tað verða umleið 17 døgurðar koyrdir út í dag, og tað eru sum sagt heimarøktararnir, sum koyra matin út í døgurðatímanum.

Einar sigur, at tey ikki eru komin heilt á mál enn við innsavningini, so tí hava tey ikki verið og hugt eftir, hvat fyri bili tey kundu hugsað sær, men hann kallar tað ein kombineraðan matbil. Tað vil siga, ein bil, sum kann nýtast til annað endamál enn bert at koyra døgurðar út við.

Tombolaið í góðveðrinum leygardagin var vælvitjað. Tað vóru umleið 250 vinningar, og tað gingu bert um 2 1/2 tími, so var alt liðugt.

- Handlarnir í Klaksvík hava eisini tikið væl undir við hesum og stuðlað okkum nógv, sigur Einar.

Hann heldur, tað vera sera hugaligt at fara undir tílíkt, tá ein møtir vælvilja allastaðni.

## Tørvur á umlætting

Tørvurin á umlætting millum tey eldru er stórur í Klaksvík. Tað er tí serliga torført at fáa hendur á, men Einar vónar, at tað nýggja heimið, sum er í ger á Helnabrekku fer at gera sítt til at enn fleiri eldri fólk kunna koma út til umlætting.

Tey eldru eru kanska eitt sindur ørkymlað við at fara úr teirra heimi inn á ein stovn, summi halda seg enntá aftur og nokta at fara. Og Einar skilur tey væl.

- Tað er jú ein stór avgerð at taka. Tey skulu jú út úr teirra heimi og vanligu umstøðum, so tað er onki at siga til. Men her kunna tey altíð fáa hjálp, um teimum tørvar tað. Eg haldi, at tey sum oftast aftaná einar tveir mánaðir finna út av, at hetta er ikki so galið. Tey duga at síggja, at tey ikki verða so bundin her. Teimum stendur púra frítt at fara út, tá tey vilja og at fara har, tey vilja, sigur Einar, sum heldur, at tey eldru skulu bert geva tí ein møguleika.

Tí heldur Einar eisini, at umlætting er ein góður máti at venja seg við. Bæði hjá starvsfólkunum og ikki minni hjá tí eldra.

- Tá fáa tey góðar stundir til at finna út av, um tey trívast á einum slíkum staði, og tað gera tey sum oftast, sigur Einar Joensen.

Norðoya Ellis og Vistarheim hýsir í dag 11 búfólkum, sum eru har alla tíðina. Meðalaldurin á búfólkunum liggur um tey 90.


**GÓÐIR BRÚKTIR BILAR**

**Nissan Micra 1,0**
grønur, 3 hurðar,
árg. 2000, 27.000 km.
**88.000**

**Nissan Primera 1,6**
svartur, 4 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
**110.000**

**Nissan Primera 2,0 SLX**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1997, 45.000 km.
**105.000**

**Nissan Primera 1,6 LX**
gráur, 4 hurðar,
árg. 1995, 126.000 km.
**69.000**

**Nissan Primera 2,0**
reyður, 4 hurðar,
árg. 1991, 121.000 km.
**47.000**

**Nissan King Cab 4x4 Diesel Turbo**
blágráur, 2 hurðar,
árg. 1998, 55.000 km.
**130.000**

**Nissan King Cab 4x4 Diesel**
gráur, 2 hurðar,
árg. 1996.
**78.000**

**Peugeot 106 Diesel**
gráur, 3 hurðar,
árg. 1996, 110.000 km.
**72.000**

**Peugeot 206 XR 1,4**
svartur, 3 hurðar,
árg. 1999, 88.000 km.
**100.000**

**Peugeot 306 DT 1,9**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1997, 150.000 km.
**90.000**

**Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1994, 230.000 km.
**120.000**

**Peugeot 306 Hdi 2,0 St.car**
svartur, 5 hurðar,
árg. 1998, 60.000 km.
**120.000**

**Peugeot 405 ST 1,9 DT.**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1996, 58.000 km.
**125.000**

**Opel Corsa 1,4**
reyður, 5 hurðar,
árg 1996, 105.000 km.
**68.000**

**Opel Corsa 1,2S**
reyður, 5 hurðar,
árg. 1990, 120.000 km.
**10.000**

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
**67.000**

**Opel Astra 1,7dt Van**
grønur, 5 hurðar,
árg. 1995, 106.000 km.
**50.000**

**Opel Astra 1,7 DT**
beige, 5 hurðar,
árg. 1996, 95.000 km.
**85.000**

**Opel Astra 1,7 DTl**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 108.000 km.
**99.000**

**Opel Astra 1,7Dtl**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1997, 108.000 km.
**99.000**

**Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir**
Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

**P/F Meinhardt Arge**
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin